## DAGSINS MEINING

# Andin úr Leynum

Ríkisfundurin er eitt rættiliga nýtt fyribrigdi. Hetta er fundur á hægsta stigi millum leiðararnar í Danmark, Grønlandi og í Føroyum. Ríkisfundur hevur altíð verið umgyrdur við ikki sørt av dulspeki ella mystikki. Hvat er hetta fyri ein fundur? Hvønn mynduleika hevur fundurin? Hvørji eru endamálini við fundinum? Hvør er dagskráin? Hvat fer fram á fundinum? Hví er eingin almenn fundarfrágreiðing? Hví verður hann hildin á fjarskotnum eksotiskum plássum sum t.d. í Tindhólmi o.s.fr. Hesuferð var ríkisfundurin hildin í náttúruvøkru bygdini Leynum. Bygdarnavnið Leynar kemur, eftir hvat teir lærdu siga, av staðarnavninum loynihavn, altso eitt pláss, har loyniligar og duldarfull hendingar og gerðir í gomlum døgum eru farnar fram.

Hóast súmbolikkurin ella myndamálið sostatt kann tykjast hóska væl til fyribrigdið ríkisfundur, so tykist einki loyniligt ella løgið at hava verið við fundinum seinasta mánadag í Leynum. Tvørturímóti, so var fundurin eyðkendur av opinleika og nøkrum fyri ein ríkisfund óvanliga ítøkiligum og týdningarmiklum málum. Hetta er avgjørt ein styrki fyri fundin og fyri viðurskiftini millum tær tríggjar tjóðirnar í ríkisfelagskapinum. Vit kunnu bert gita, hvør orsøkin til hetta kann vera. Tað liggur nær at halda, at hetta kemur av, at viðurskiftini millum ovastu donsku og føroysku myndugleikar ikki eru so spent longur. Her er komin ein linni. Hetta stendst ivaleyst av yvirtøkulóg og uttanríkspolitiskari heimildarlóg.

Av ítøkiligu málunum eiga vit at nevna EFTA, Norðurlandaráðið og viðurskiftini millum báðar tjóðirnar í Útnorði, sum enn eru innan ríksfelagskapin. Hóast løgfrøðiligar og tekniskar forðingar er eingin ivi um, at Føroyingar eru á veg móti betri marknaðarviðurskiftum t.d. við EFTA limaskapi. Við EFTA limaskapi høvdu vit fingið somu fyrimunir við atliti at ES sum eitt nú EFTA londini Noreg og Ísland. Fundurin staðfesti, at ongar politiskar forðingar eru bert løgfrøðiligar og tí eiga embætisverkini í Føroyum og í Danmark alt fyri eitt at fara til verka til tess at beina burtur hesar forðingar. Sostatt ein jalig framtíðarmynd á hesum øki. Støðan við atliti at Norðurlandaráðnum var ikki minni jalig. Her tykist veruliga gongd at vera komin á og danska stjórnin hevur flutt seg langt í hesum máli. Heldur ikki her er talan um politiskar forðingar longur, men um løgfrøðiligar spurningar, sum kunnu loysast. Hetta sigur nakað um diplomatisku evnini hjá løgmanni og landsstýrisformanni, at teir hava megnað at flyta politiska træknívin Anders Fogh Rasmussen frá blankt at nokta Grønlandi, Føroyum og Álandi sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum til at boða frá, at hetta mál nú kann verða loyst og hartil at lova at stuðla málinum politiskt. Her er komin ein nýggjur andi inn í ríkisfelagskapin og gita vit, at hann fer at verða nevndur leynaandin. Tað byrjaði við Tvøroyaraskjalinum, har tað eydnaðist Anfinni Kalsberg við stórum diplomatiskum hegni at fáa Fogh á glið í sjálvstýrismálinum. Tvøroyrarskjalið gjørdist fyrsta stigið til viðurkenningar av okkara sjálvsavgerðarrætti. Viðurskiftini í ríkisfelagskapinum tykjast nú at vera á eini fyri Føroyar og Grønland gagnligari kós. Andin úr leynum leggur stóra ábyrgd á allar partar, ikki minst á Føroyar og Grønland. Víst var Anders Fogh óvanliga politiskt flytførur og politiskt fyrikomandi. Hann og sýndi í Leynum góðan vilja at flyta seg í málum av avgerandi týdningi fyri okkum. Men sær sjálvum líkur legði hann sum ikki einaferð bóltin á føroysku hálvuna, áðrenn hann fóra av Leynasandi. Her er enn ein stór avbjóðing til okkara politisku skipan.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vegaføringin gjøgnum Lorvík

**Jógvan E. Joensen**
*13. juli 2005*

Í einari grein herfyri hevði Jógvan Páll Sevdal eina grein um fyrimunir og vansar í teim ymisku uppskotunum um vegaføring. Hansara sannføring er at »Lokrennuloysnin« er besta loysnin.

Rætt skal vera rætt, sæð frá sjónarmiðinum hjá teim **ferðandi** er ein partur av hesum pástandunum rættir.

Bygdarfólkið fær tó avmarkaða nyttu av hesi loysnini, men kommunan fær frígivið nakað av byggilendi, væl at merkja um 80 km vegurin skal gerast við breiðum frástøðu øki til vegin. Tað undrar meg bara, at tá talan er um vegin í samb. við lokrennuna, tá kann hann koma tætt fram við bygdum øki. Tað at J. P. pástendur, at 130 grundstykkir verða mist, fari eg at loyva mær at ivast í. Sjálvandi skulu vegir gerast oman fyri bygdina, tá bygt verður, antin tað verður kommunan ella landið. So stórur munur man tað neyvan vera á mista økinum, um tað er landsvegur ella ein kommunalur vegur. Men ein munurin verður tann, at verður tað kommunalur vegur, skal kommunan viðlíkahalda, meðan hon sleppur undan hesum um hann verður lands.

Tað, sum sær út til at hugtaka menn mest, er henda »geniala« loysnin við lokrennu. Hon er tó ikki meira genial enn so, enn at hon verður brúkt so manga staðir.

Nærliggjandi var tí at hugsa, hví kroysta hana her niðri í bygdini, har **mest** er til hindurs fyri at gera hana.

Hví ikki leggja lokrennuna oman fyri bygdina, har **onki** er til hindurs fyri at gera hana, event. í brekkujaðaranum? Tá kundi verið bygt dygst í hana, kanska oman á henni, um onkur hevði hug til tað.

*Stutt sagt, flytið ta »genialu loysnin« niðan um bygdina í staðin fyri at kroysta hana niðri í bygdini.*

Fyri somu pengar kundi tá helst tann dupulta longdin, kanska 1 kilometur ella meira, verið lagt undir heilt. Var tað ikki vert at hugsa um?

Lag tá manni hevði tá verið at lagt kloakkskipan, vatnleiðing, elkáplar, fjarhita og fjarskiftiskáplar í sama viðfangi, tað átti at verið ein fyrimunur.

Onki nýtist J.P. at órógva ferðandi við útsynningshvirlunum uppi í Brekkum, onki kenni eg til at tær eru mjúkari, tá tær koma oman í Bólagerði.

Larmur og dálking av ferðslu verður ofta havt á máli. Eg trúgvi, at um 20-30 ár verður tað hvørki loyvt at larma ella dálka. Bilar eru longu nú farnir at koyra við gassi, alkohol, ja enntá matolju, so her koma at henda broytingar til tað betra, áðrenn vit vita av, serliga um oljan fer at verða so kostnaðarmikil, sum hon er nú.

# Revsið ikki øll fyri apukattalótirnar

**Petur Hermansen**



Aftan á at hava lisið greinina um ferðsluóhappið í Havn mánanáttina má eg viðganga, at tað sær út fyri mær sum, tey sum koyra skilaleyst og hvørki hava sans ella samling millum oyruni, eru tey, sum skulu avgera, hvussu HAVNARBÝUR skal síggja út. Her vil eg fegin siga frá, at tað IKKI eru hesir fáu apukattarnir, sum skulu gera av, hvussu restin av havnarfólki skal noyast at koyra.

So Heðin Mortensen, borgarstjóri, um hetta er loysnin hvørja ferð ein klovnur koyrir ov skjott ella ger okkurt annað, so skal ein bunga gerast ella tvær, so verður Havnarbýur einaferð sera spennandi at koyra sær ein túr í.

Einaferð enn Heðin, tað eru ikki hesir tápulingarnir sum skulu avgera, hvussu Havnin skal síggja út.

Tað eru ikki tey mongu havnarfólk, sum skulu revsast, men tey, ið koyra SKILALEYST.

# 0 (les: NULL)

**Randi í Jógvanstovu**
*Leirvík*



So nógv leggur hann, Bjarni Djurholm, í okkum leirvíkingar.

Vit og framtíð okkara her hava ikki tað minsta at siga fyri honum.

Tað hevur hann prógvað nú. Skriv er nú sent út til løgtingsmenn, har ***hann*** mælir til at ein 80-km/t vegur, teknaður av Landsverki, verður lagdur ígjøgnum Leirvík.

Snildisliga er hann lagdur, hesin vegurin, gjøgnum fleiri øki, sum eru friðað, m. a. Limmulund. Hann veit væl, at friðingarmyndugleikarnir fara at mótmæla. So verður vegurin fluttur longur oman móti bygdini. Tá verður tað ikki ***hann sjálvur***, sum er hin seki, ið hevur lagt vegin ígjøgnum besta byggilendið í Leirvík. Snilt, ha?

Hann kundi bara sagt sum er, at hann vil sk... á, hvat vit meina her í Leirvík og framtíð okkara.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.